# Halda veitslu fyri 250 fólkum í Vági

**Í Vági verður nýggjárið hildið sum vanligt við stórari veitslu, gudstænastu, kyndlagongu og dansi til tann ljósa morgun**

NÝGGJÁRSHALD
*Áki Bertholdsen*

Vágur er nýggjársbygd burturav, tí ongastaðni í landinum verður gjørt so nógv burturúr ársskiftinum, sum har. Nýggjárshaldið, sum vit nú kenna tað í Vági, hevur sín uppruna heilt afturi í sekstiárunum og síðani hevur tað funnið sín fasta form.

Tey ringastu kreppuárini vóru tað tó kortini onkur ár, sum duttu burtur ímillum . Tá varð ongin veitsla í eini tvey ár, fólk høvdu líkasum ikki ráð, ella hug.

Men síðani er tað lýsnað aftur í Vági so tað munar, og árið í ár verður onki undantak.

Dennis Holm í nýggjársnevndini, sigur, at nýggjárshaldið í Vági í ár, verður aftur sum vanligt, eftir at nógv meiri varð gjørt burturúr í fjør á túsundáraskiftinum í fjør.

Nýggjárhaldið byrjar við stórari veitslu í VB húsinum, har borðreitt verður við røstum kjøti og súpan fyri einum 250 fólkum.

Atgongumerkini til veitlsuna skuldu seljast í gjárkvøldið og Dennis Holm sigur, at nýggjársnevndin hevur týðuliga merkt, at tað er stórur áhugi fyri veitsluni, tí hesar seinastu dagarnar hevur nógv fólk ringt at fregnast.

Á veitsluni fara Niels Petur Nolsøe, Petur Dahl Nolsøe og Arnfinnur Thomassen at undirhalda.

Aftaná veitsluna er gudstænasta og tá ið hon er liðug um midnáttarleitið, verður kyndlagonga frá skúlanum, vestur á Trýkantin á Sandinum, har tað stóra bálið verður.

Dennis Holm sigur, at tað verða einir 100-120 kyndlar gjørdir. Kyndlarnir verða gjørdir í ymsum støddum, so at eisini yngra ættarliðið og konufólk, sum hava hug at bera, kunnu vera við.

Aftur í ár hevur nýggjársnevndin ein gamlan bát at brenna. Hetta at brenna bát á nýggjárinum í Vági er so inngrógvið, at tað er komið fyri, at fólk norðaneftir hava sent teimum bát suður at brenna. Ímeðan bálið brennur, verður dansað rundanum trýkantin og fýrverk skotið. Nýggjársnevndin keypir hvørt ár eina rúgvu av fýrverki, sum verður skotið ta løtuna, bálið er.

Eftir kyndlagonguna fara Hans Jacob og vinmenn at spæla til dans og hann plagar at vara til tann ljósa morgun



*Sum vant verður aftur stórt nýggjarshald í Vági í ár*

# Verkfall hóttir kavarudding

**Ósemja hevur aftur tikið seg upp ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Landsverkfrøðingin um arbeiðsviðurskiftini hjá teimum, sum rudda kava av vegunum**

KAVARUDDING
*Áki Bertholdsen*

Tað skal ikki koma óvart á nakran um øll kavarudding hjá Landverkfrøðinginum brádliga heldur uppat ein av fyrstu døgunum.

Kavaruddingin hjá Landsverkfrøðingin er ein lívsæðrin í samfelagnum, tá ið tað kavar, tí tað er henni fyri at takka, at øll samferðslan eftir landi kann haldast gangandi. Verða vegirnir ikki ruddaðir fyri kava, fer tað tí at leggja næstan alt landið lamið, um hann legst við kava.

Umframt at rudda kava av vegunum, ger Landsverkfrøðingurin eisini nógv burturúr at stroyða sand og salt á vegirnar, tá ið tað er hált, og tað arbeiðið fer sostatt eisini at halda uppat.

Orsøkin til at kavaruddingin er í vanda, er, at ósemja hevur aftur tikið seg upp ímillum Landsverkfrøðingin og Føroya Arbeiðarafelag um arbeiðsviðurskiftini hjá teimum, sum rudda kavan.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur at støðan er so snøgg: Fáast viðurskiftini ikki í rættlag, sleppur fólkið heldur ikki at rudda kava og so heldur øll kavarudding uppat.

Tað var sama skilið í fjør, tá í ósemja tók seg upp um kavaruddingina.

Tann ósemjan endaði við, at avtala varð gjørd í vár ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Landsverkfrøðingin um treytirnar hjá teimum, sum rudda kava og sostatt slapst undan at samferðslan varð løgd lamin ta ferðina.

Men tað er hendan avtalan, sum Landsverkføðingurin nú ikki vil halda, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið ein fleiri klagur frá teimum, sum rudda kava um, at Landsverkfrøðingurin vil ikki halda avtaluna, sum varð gjørd seinasta vár. Hon sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur biðið teir, sum rudda kava um eina frágráðing.

– Tá ið hendan frágreiðingin er komin, fara vit at taka støðu til, hvat skal gerast.

Av tí, at frágreiðingin ikki er komin frá monnunum, fær hon ikki sagt, akkurát, hvørjar partar av avtaluni, tað er, sum Landsverkfrøðingurin ikki vil halda.

## Skal haldast

Ingeborg Vinther leggur dent á, at tað verður ikki talan um at samráðast um eina nýggja avtalu við Landsverkfrøðingin um kavaruddingina.

– Vit hava gjørt eina avtalu, sum báður partar hava undirskrivað. Men vil Landsverkfrøðingurin ikki halda hana, so má stovnurin eisini taka avleiðingarnar av tí, sigur hon.

– Hvørjar avleiðingar hugsar tú um. Er tað, at kavaruddingi heldur uppat?

– Ja, tað ger tað heilt vist. Vil Landsverkfrøðingurin ikki halda avtaluna, heldur øll kavarrudding uppat.

Ingeborg Vinther sigur, at tað var líka við, at øll kavarudding helt uppat beint fyri jól.

Men so váttaði Landsverkfrøðingurin, at hann vildi ganga undir okkara treytir til 3. januar, tá ið málið so skal takast uppaftur.

Tað vil siga, at tað verður arbeiðsfriður til mikudagin. Hvussu verður eftir tað, veldst so alt um, hvussu tað eydnast at semjast um avtaluna, sum partarnir gjørdu í vár.

Landsverkfrøðingurin:

# Vit vita ikki hvat er galið

**– Vit eru sinnaðir at halda avtaluna um kavarudding og vit skilja ikki, hvat er galið, sigur Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur**

KAVARUDDING
*Áki Bertholdsen*

Vit eru sinnaðir at at halda avtaluna við Føroya Arbeiðarafelag um kavarudding í odd og egg. Og tað gera vit eisini.

Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur, sigur, at hann skilir ikki rættiliga atfinningarnar frá Føroya Arbeiðarafelag ímóti stovninum fyri ikki at halda avtaluna, sum varð gjørd í vár, um kavarudding.

Sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag, at fleiri av teimum, sum rudda kava, hava klagað um, at Landsverkfrøðingurin ikki vil halda avtaluna um kavarudding.

Og hon sigur at støðan er gangandi greið: Vil Landsverkfrøðingurin ikki halda avtaluna, má hann eisini taka avleiðingarnar av tí. Og avleiðingarnar eru, at øll kavarudding heldur uppat.

Oyvindur Brimnes sigur, at hann skilir ikki ónøgdina.

– Vit halda, at vit hava hildið avtaluna, sum er gjørd, og tað eru vit eisini sinnaðir at gera í odd og egg.

Hann leggur afturat, at Landsverkfrøðingurin hevur boðað Føroya Arbeiðarafelag frá, at er felagið ikki samt við Landsverkfrøðingin um, hvussu avtalan skal tulkast, má tað venda sær til Arbeiðsgevarafelagið, tí tað er Arbeiðsgevarafelagið, sum hevur sáttmálan.

Oyvindur Brimnes sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur fingið skriv frá Føroya Arbeiðarafelag, har tað ger vart við, at avtalan er ikki hildin.

– Av tí, at vit eru av teirri sannføring, at avtalan er hildin, hava vit biðið Føroya Arbeiðarafelag um eina nærri frágreiðing um, hvat er galið.

– Tað frágreiðingina hava vit ikki fingið enn.

– Vit mugu fyrst hava fulla greiði á, akkurát, hvat tað er, sum er galið, sigur Oyvindur Brimnes.

Tað skilst kortini á honum, at hann hevur varhugan av, at at tað er okkurt við fráboðanarskylduni hjá Landsverkfrøðinginum, sum Føroya Arbeiðarafelag ikki er nøgt við.

Í avtaluni, sum er gjørd um kavarudding, stendur m.a., at teir, sum rudda kava, skulu hava boð við eini ávísari freist, tá ið teir skulu vera tøkir, tí teir skulu hava løn fyri at vera tøkir.

Og tað skilst á Landsverkfrøðinginum, at tað helst er hesin parturin av avtaluni, sum Føroya Arbeiðarafelag er ónøgt við umsitingina av.

– Men í hesum sambandi er støðan tann, at vit vilja fegnir sjálvir gera av, nær vit halda, at tað er neyðugt, at menninir eru tøkir, sigur Oyvindur Brimnes.

Í samrøðuni við Ingeborg Vinther aðrastaðni í blaðnum, sipar hon til, at arbeiðsfriður verður til 3. januar, tí um jólini og á nýggjárinum hevur Landsverkfrøðingurin játtað at gingið undir treytirnar hjá Føroya Arbeiðarafelag.

– Tað, sum vit hava gjørdu undan jólum er, at vit góvu monnunum, sum rudda kava, boð um at vera tøkir til 3. januar. Og tað er heldur ikki í stríð við okkara tulking av sáttmálanum. Men vit vilja framvegis sjálvir gera av, nær vit halda, at tað er neyðugt at hava menniniar tøkar, og nær tað ikki er neyðugt. Og vit halda tær freistir, sum eru avtalaðar, sigur Oyvindur Brimnes.

# ítróttur

Nr. 251 • leygardagur • 30. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

## Januar

# Nú kemur A-landsliðið í hondbólti



*Petur Ove Petersen, formaður í HSF, er fegin um, at føroyingar nú aftur fáa eitt A-landslið í hondbólti. Bæði á mannfólka- og konufólkasíðuni*

### 4. januar

Tað verður kunngjørt, hvør verður nýggjur venjari hjá AGF og Óla Johannesen. Talan er um Ove Christensen, sum ætlandi tekur við starvinum eftir summarsteðgin. Hann hevur framman undan verið venjari hjá Viborg, og hevur annars verið upp á tal sum danskur U-18 landsliðsvenjari.

### 5. januar

Kenneth Wgner er sagdur úr stjórastarvinum hjá danska oddaliðnum, Herfølge. Alment verður sagt, at hann og leiðslan í felagnum ikki eru samd um framtíðar politikkin.

### 6. januar

Herfølge styrkir um hópin undan oddastríðnum í superliguni. Nýggjur leikari er Chris Hermansen, sum kemur úr AB, hagar hann varð seldur úr júst Herfølge.

Besta kvinnuliðið hjá HB tykist ikki sleppa at kappast við meistaraliðini úr hinum Norðanlondunum. Orsøkin er, at fleiri av hinum liðunum hava givið avboð, tí kapping fyri U-21 landslið verður hildin í Týsklandi um sama mundi.

### 7. januar

HSF ger av, at føroyskt A-landslið í hondbólti aftur skal setast á stovn. Fíggingin fæst m.a. frá veddingarpengunum, sum ÍSF fær frá Dansk Tipstjeneste. Boðað verður samstundis frá, at fyrsti dystirnir hjá monnunum væntandi verða móti Grønlandi, meðan kvinnurnar ætlandi skulu royna seg móti Íslandi.

VÍF tjóvstartar endaspælið hjá monnum, tá teir vinna sannførandi móti H71.

### 11. januar

Hondbóltskappingin er av álvara farin í gongd aftur. Mest merkisverdu úrslitini eru, at Neistin vinnur báðar grannauppgerðirnar móti Kyndli. VÍF og Stjørnan eru á odda hjá ávíkavist monnum og kvinnum.

John Heri Dam og Rúni í Soylu fara til Noregs, har teir skulu royna seg hjá Jotun í triðbestu deildini. Venjari hjá Jotun er Kári Reynheim.

10 ára gamli Oddmar Færø verður kosin ársins leikari á einum av økisliðunum í Aberdeen.

Havnin er framvegis á odda í liðkappingini í talvi, men munurin niður til klaksvíkingar er nú bert hálvt annað stig.

### 12. januar

Venjarin hjá bestu kyndilskvinnunum, Flmming Raben, leggur frá sær eftir ósigurin fyri Neistanum.

### 13. januar

Lassin Isaksen fer í ferðalag við føroyska landsliðnum til Spania. Har skal hann døma dystin millum Finnland og Ísland.

Torben Piechnik verður sagdur úr starvi hjá AGF. Nýggjur maður at taka sær av leikarahandlum verður Dan Iversen. Piechnik var maðurin, sum stóð aftan fyri keypið av Óla Johannesen.

Í Grand-Prix kappingini í borðtennis er Petur Niclassen fremst í meistaradeildini hjá monnum. Hjá kvinnunum er Paula Eikhólm fremst.

### 14. januar

Fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini hjá monnum verða leiktar. Í báðum førum gerst talan um teprar eitt máls sigrar til ávíkavist StÍF og Kyndil móti Neistanum og VÍF, so enn eru allir møguleikar opnir.

### 15. januar

FCK, har Todi Jónsson telist millum leikararnar, sigst vera áhugað í at keypa Tivoli.

HB skrivar sáttmála við unglingaleikaran, Pætur Dahl.

Flogbóltskappingin byrjar aftur, og nú stendur endaspælið fyri framman.

### 18. januar

Kvinnurnar hava avgreitt fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini í hondbólti. Neistin vinnur tepurt á VB, meðan Kyndil heldur óvæntað vindur burtur úr favorittunum úr Stjørnuni. Í landskappingini hjá monnum vinnur Kyndil stórsigur á StÍF, eftir at strandingar høvdu greiða leiðslu í steðginum,

Í bestu mansdeildini í flogbólti tekur Fleyr annað liðið úr kappingini, sum nú bert telur fimm lið.

TB hevur gjørt sáttmála við Lynge Nielsen um at venja fremsta fótbóltslið felagsins hetta kappingarárið.

Fleyr og Mjølnir halda fast um fremstu sessirnar í bestu mans- og kvinnudeildini í flogbólti. Fleyr fekk tó ein hvøkk, tá teir móti SÍ taptu fyrra hálvleikin.

Í toppdystinum í talvkappingini vinnur Havnar Talvfelag tepurt á Klaksvíkar Talvfelag, og munurin teirra millum er nú øktur upp í hávlt triðja stig.

### 19. januar

Ivamál tykist vera um, hvørt kappingin um Atlantsrisan verður hildin í ár. Sjónvarpið hevur ikki ráð at vera til at fíggja kappingina.

15 ára gamli gøtudrongurin, Kenneth Danielsen ger rættiliga um seg í Danmark, har telist millum fremstu motor-cross koyrararnar á Sælandi.

### 20. januar

KÍ hevur til komandi kappingarár gjørt sáttmála við seks av ungu leikarum felagsins, soleiðis at teir tryggja sær framtíðina.

Kvinnurnar á Jarnbardi gera av fara til Scillyoyggjarnar at rógva kapp. Framman undan eru føroyameistararnir hjá 10-mannaførum við monnum bodnir at koma niður. Kvinnurnar fíggja sjálvar ferðina til Scillyoyggjarnar.

### 21. januar

Dramatikkur stóð ovarlaga á skránni, tá Kyndil og VÍF hittust uppi á Hálsi. Dysturin endaði við teprum VÍF sigri, sum framvegis heldur fast um oddasessin í bestu mansdeildini.

Nýggja liðið í fremstu fótbóltsdeildini, FS Vágar, hevur styrkt um hópin við fýra litaviskum leikarum.

### 22. januar

Skráin hjá A-landsliðnum í fótbólti er løgd. Ár 2000 telur heimadyst móti Slovenia umframt útidystir móti Sveis og Jugoslavia.

HB arbeiðir við at at styrkja um liðið við einum rumenskum álopsleikara.

Landsliðsvenjarin í hondbólti, Palli Joensen, hevur úttikið 17 leikarar til fyrstu landsliðsvenjingarnar.

### 25. januar

Hans Fróði Hansen hevur fyri aðru ferð brotið óstbeinið. Liðfelagi hansara í Sogndal, Kurt Mørkøre, er eftir longri steðg aftur í landsliðshitanum.

Sensatiónin lúrdi í Vestmanna, tá Tjaldur var á vitjan. Tað eydnaðist tó oddaliðnum at toga ein tepran eitt máls sigur í land. Hjá kvinnunum er Stjørnan framvegis fremsta liðið.

Djóni N. Joensen, sum seinnu árini hevur leikt við B36, fer aftur til barndómsfelagið, NSÍ.

Forkunnugur talvdystur verður hildin um alnetið, tá føroyskir útisetar kappast við heimligu telvararnar. Útisetarnir vinna dystin 9,5-6,5.

### 26. januar

Fleyr hjá monnum og Mjølnir hjá kvinnum eru púrasta suveren í sínum kappingum. Aftur hetta vikuskiftið vunnu liðini bæði sínar dystir.

Borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, sigur at arbeitt verður við at fáa nýggjan graslíkisvøll til Klaksvíkar. Vøllurin er annars bert eitt ára gamla, men tá regnið er nógv, fær vøllurin ikki staðið ímóti.

Føroya Bjór simultankappingin í Bridge er spæld. Vinnarar gjørdust Páll Sigmund Sørensen og Debes Christiansen.

### 28. januar

Fyrsti finaluluttakarin í steypahondbóltinum er funnin. Neistin vinnur trý mála sigur á StÍF, sum annars vann við einum máli í fyrru hálvfinaluni.

Herfølge hevur styrkt um hópin við nýggjum eykamálverja. Hetta tí teir rokna við møguleikanum fyri, at Jákup Mikkelsen verður seldur.

### 29. januar

Í finaluni skal Neistin hitta Kyndil. Eftir tveir dystir móti VÍF var samlaði munurin eitt mál, so minni kundi munurin nærum ikki verið.

Í kvinnuhondbóltinum dregur Stjørnan frá hinum liðunum, eftir stórsigur á VÍF. Talan var annars um javnleik í hálvleikinum.